# Soleiðis tekur tú

**Nú tað er vorðið alt lættari at taka myndir og at goyma tær á telduni, kunnu vit øll somul royna okkum sum myndafólk, uttan at fara á húsagang. Men tað er nógv stuttligari, um myndirnar eru hampiliga góðar. Her eru nøkur góð ráð og hugskot til, hvussu tú tekur góðar myndir.**

*Lagt til rættis: Anna V. Ellingsgaard*
*Myndir: Álvur Haraldsen*







## Bólkamyndir

Soleiðs fært tú øll á eini bólkamynd at taka seg væl út.

- Vel eina so róliga bakgrund, sum til ber
- Ansa eftir, at fólkini ikki fáa sólina í eyguni, so tey snerkja við eygunum. Tak myndina í skugga, um neyðugt.
- Ver ikki bangin fyri at geva ordrar um, hvar fólk skulu standa ella at biðja tey stilla seg tætt saman meðan myndin verður tikin
- Stilla tey minstu framman fyri tey størstu og fá uppsetingina so symmetriska, sum gjørligt
- Ansa eftir, at øll síggja myndatólið við báðum eygum. Tað er ikki nokk, at tey síggja tann, sum tekur myndina
- Á myndum, har fólkini sita, skulu tey sita pent




## Andlitsmynd í mótljósi

Nógv eru bangin fyri at taka andlitsmyndir í mótljósi, men tað kann ofta vera besta loysnin

- Stendur persónurin í fullum viðljósi, tvs. fær sólina beint í eyguni, er tað trupult at fáa eitt avslappað andlitsbrá. Oftast kasta brillur og nøs eisini harðir skuggar inn yvir andlitið
- Royn og snara modellini á, soleiðis at hon stendur í mótljósi, tvs. at sólin kemur aftanífrá, so modellin fær slappa av og hildið eyguni opin
- Ansa bara eftir, at sólin ikki stendur beint inn í linsuna á myndatólinum
- Far heilt tætt at persóninum, so andlitið fyllir mest møguligt á myndini
- Um neyðugt, brúka so blitz fyri at lýsa andlitið upp
- Tú fært vakurt viðljós, tá sólin stendur heilt lágt, tvs. við sólarris og sólsetur

